# Kjak



**Jógvan Arge**
*Formaður í mentamálanevndini í Havn*

## Høllin við Landavegin

Nú bleiv so nógv umrøða av høllini, sum hondbóltsfelagið Neistin fer at byggja við Landavegin í Havn. Tað er bara gott.

Hetta málið er eitt av teimum týðiligastu prógvunum um, at øll í Føroyum eru ikki líka fyri lógini.

Samstundis, sum landið við rundari hond stuðlar badmintonhøll í Klaksvík og ítróttarhøll á Sandi, alt gott um tær at siga, so vil landið ikki stuðla bygging av nýggjari ítróttarhøll í Havnar kommunu.

Tað ásannar Tórshavnar býráð, og skal høvuðsstaðurin ikki gerast eftirbátur í ítróttar- og trivnaðarmøguleikum, noyðist hann at taka slík mál í egnar hendur – so leingi skil er í tí.

Hesaferð var kortini ikki so nógv nýtt í málinum um Neistahøllina. Tann prinsipiella støðan um eykastudning til høllina fyri tann studningin, sum væntaður var frá landinum, varð tikin á almennum býráðsfundi longu í juni, tá eitt samt býráð tók undir.

Hesaferð varð gjørd ein regulering av útgjaldinum av eyka íløgustuðlinum úr 10 árum niður i trý ár vegna tess, at tað varð ikki hildið skilagott at tamba hann ov langt út. Eisini hetta varð einmælt samtykt.

Hondbóltsfelagið Neistin hevur gjørt eitt megnararbeiði at fáa til vega pening til hesa høll. Felagið kemur sjálvt við heili 10 milliónum krónum.

Staðsetingin er sera áhugaverd í tí í ítróttarhøpi ikki sørt .tilafturskomna Vesturbýnum, sum eins og kommunan øll hevur hesa høll avgjørt fyri neyðini.

Málið hevur ligið meir og minni á býráðsins borði í átta ár, so nú var tíð upp á at fáa tað frá hondini.



**Dagfinnur Danbjørg**

## 200 mill. kr. ganga leysar

Mær er fortalt, at uml. 200 mill. kr. ikki koma til skattingar um árið. Er tað satt, so koma uml. 100 mill. kr. ov lítið inn í skatti á hvørjum ári. Hetta kunnu myndugleikarnir finna út av, um politiski viljin er til tess. Sakkunnleiki - um neyðugt uttaneftir - kann keypast til at loysa uppgávuna. Verður farið 5 ár aftureftir - sum lógin loyvir - so kunnu 500 mill. kr. eyka verða til taks til at loysa átroðkandi samfelagsuppgávur. Bæði tey, ið liva á lívsins skuggasíðum, og tey, ið vilja bróta upp úr nýggjum kunnu soleiðis fáa neyðugan stuðul, so liviligt kann verða verðandi hjá okkum øllum, ið búgva í hesum landi.

At nevndu mill. ganga leysar, samstundis sum skattalætti hevur verið givin teimum vælbjargaðu, vísir politiska viljan ella illviljan. Skattaholini eftir skattalættan skulu nú teir vanligu og veiku skattgjaldararnir fylla uppaftur við peningi, sum tey ikki hava og við at góðtaka niðurskurðar, sum í mongum førum eru óacceptablir.

Hetta er inkarneraður asocialur og arbeiðarafíggindaligur politikkur, sum Javnaðarflokkurin ikki bert stuðlar, men gongur á odda fyri at reka: ein viðvend Robin Hood útgáva, sum tekur frá teimum. ið lítið og onki hava fyri at geva teimum, sum longu hava í yvirflóð.

---

Nevndin í HUXA

# MFS vanvirðir skattaborgaran

*HUXA finst hvassliga at Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS), tá ið tey í lesarabrævi sáa iva um framtíð føroyinga, tí flogferðastuðulin lækkar við 1.000 kr.*

**Grenj**

Tað er fullkomiliga burturvið, ikki minst ótakksamt, tá ið MFS skírir Føroyar fyri ikki at hava nakra framtíð. Sambært lesarabrævinum, sum er bæði svartskygt og harðorðað, koma føroyingar ikki aftur, tí teir kenna seg ikki vælkomnar. Tískil hugleiða tey retoriskt "*Hava Føroyar eina framtíð?*" Tey áttu at vita betur. Føroyar eru uttan mun til onnur lond tað mest framkomna landið í heiminum, tá ið tað snýr seg um stuðul til lesandi. Landið rindar alla skúlaleiðina, frá fólkaskúlanum til universitetið, harumframt fáa lesandi pengar fyri at ganga í skúla. Føroyingar (tosi um egnar royndir) liva sum greivar í ymisku londunum, tí lesandi frá øðrum tjóðum fáa ikki eitt klovið oyra til studning ella skúla.

**Burturvið**

Vit verða tískil noydd at spyrja, hvør rindar fyri útbúgvingarnar hjá MFS limunum? Hvør rindar fyri stuðul og ferðaseðlar? Eru limirnir úr Meginfelag Føroyskra Studenta av tí sannføring, at pengarnir hjá skattaborgarunum eru til onga nyttu, tí umframt ókeypis útbúgving og skattafríar pengar verða avleiðingarnar av lækkaða flogferðastudninginum katastrofalar. Tey siga í lesarabrævinum, at "*Heldur enn at síggja álvaran í, at bara ein út av fýra lesandi við vissu ætlar aftur til Føroyar, ætla landsstýri og løgting at fáa lesandi til at kenna seg minni vælkomin í Føroyum*". Um vit lesa í millum linjurnar, stendur: um flogferðastuðulin verður lækkaður, flyta færri fólk aftur. Eru vit komin so langt út, at føroyska framtíðin liggur í vanda, tí at lesandi fáa 1.000 kr. minni í flogferðastudningini? Er støðan so svár?

**Oyðsl**

Haraftrat hugleiðir Meginfelag Føroyskra Studenta um arbeiðsmøguleikarnar í Føroyum: "*nullvøkstur í almennari fyrisiting hava... við sær, at tað er minni spennandi at koma aftur til Føroyar.*" Tað er ikki hissini, hvat limirnir í MFS eru krevjandi, tí eftir ókeypis útbúgving, skulu skattaborgararnir rinda fyri vitanina. HUXA er harðliga í móti hesum hugburði, tí tað eru tvey lond í heiminum, ið hava størri almenna umsitting enn Føroyar, og tað eru Kuba og Norðurkorea. Haraftrat óttast Meginfelag Føroyskra Studenta, at: "*Tað er dýrt at búgva í Føroyum, arbeiðsmarknaðurin er einstáttaður.... Tað, sum fær nøkur okkara til at koma aftur, eru kenslur so sum vón, áræði og viljin til at skapa nakað nýtt*". Ja, Føroyar eru heimsins dýrasta land, tað er eingin loyna. Ein av orsøkunum er høgi skatturin. Men so kann ein spyrja seg sjálvan: hví er skattatrýstið høgt? Hví verður arbeiðsmarknaðurin skattaður hart?

**Óvitska**

"*Vit í MFS eftirlýsa... at lesandi... verða raðfest.*" Tað er fullkomiliga burturvið, at MFS ákærir politisku skipanina fyri ikki at raðfesta útbúgving. MFS saknar áræði frá politisku skipanini, og tað er júst tað, tey fáa. Samgongan vísir ábyrgd og áræði, tá ið tey skera flogferðastuðulin við 1.000 kr. Tað er ikki populistiskt, tað er nakað, ið fær yngru veljararnar upp úr stólinum, men tað er føroyska samfelagnum at gagni. Tað, sum limirnir í MFS verða skornir við, 1000 kr. í flogferðaseðlum, er tað sama, sum miðnámsskúlanæmingar missa uppá hálvan annan mánað tvs. 400 kr. um mánaðin = 4400 kr. árliga. Um tað stóð til HUXA, so høvdu vit hálverað flogferðastuðulin, fyri at miðnámsskúlanæmingarnir kunnu varðveita sínar 2.200 kr. um mánaðin. MFS átti tískil at takka samgonguni, at tey ikki skóru alla flogferðastuðulin burtur, at tey ikki pilkaðu við studningin til næmingar undir hægri lestri. Samgongan hevur tískil rós uppiborið, at hon raðfestir útbúgvingar høgt.

**Framtíðin**

Tað skal tó eingin ivi vera í, at limirnir í MFS eru framtíðin. Tey eru fólkini, ið skulu flyta føroyska samfelagið frameftir. Tað er tó harmiligt, at Meginfelag Føroyskra Studenta heldur, at framtíðin liggur í flogferðaseðlum. Flogferðastuðulin er ein luksusvøra, og einki annað.

"Hava Føroyar eina framtíð?"

Ja.

Útbúgving er framtíðin, men hevur skattaborgarin uppiborið óneyðuga óvirðing?